# Tunnilin klárur til stevnuna

**Norðskálatunnilin verður opin aftur fyri vanligari ferðslu fríggjadagin. Tey, sum høvdu óttast fyri at noyðast um Eiðisskarð á Eystanstevnu, kunnu taka tað róligt, verður sagt frá Landsverkfrøðinginum**

SAMFERÐSLA
*Edvard Joensen*

Norðskálatunnilin verður latin upp aftur fyri vanligari ferðslu í morgin. Lýst verður, nær á degnum koyrandi verður aftur.

Finnleif Durhuus, leiðari á Vegadeildini hjá Landsverkfrøðinginum, sigur, at arbeiðið inni í tunlinum hevur gingið rímiliga væl.

Teir hava skotið eitt stórt vendipláss inni í miðjum tunlinum, sum heilt stóru lastbilarnir klára at venda á, skuldi tað gjørst neyðugt.

Umframt eru trý stór víkipláss eisini gjørd ymsastaðni í tunlinum, sigur hann.



*Spreingiarbeiðið í Norðskálatunlinum er liðugt á hesum sinni, og tunnilin verður opin aftur í morgin. Grótið, sum sprongt er burtur, verður brúkt til vegagerð á Oyrarbakka*
*Mynd: Edvard Joensen*

Seinasta skotið inni í tunlinum varð skotið í nátt, og grótið koyrt út úr tunlinum. Síðan verður loftið reinsað og tryggjað, og í morgin er klárt at koyra aftur gjøgnum tunnilin.

Grótið, sum komið er úr tunlinum, nú arbeitt hevur verið har inni, verður brúkt til tann partin av vegagerðini av Oyrarbakka út til Oyrar, sum gjørdur verður nú.

Tað, sum gjørt er í tunlinum, er arbeiði, sum gjørt er sambært krøv, sum sett verða í samband við tær fyriskipanir, ið eru fyri norsku tunlarnar, og sum føroyingar eisini brúka, sigur Finnleif Durhuus.

At hetta verður gjørt beint nú, kemst av, at serútgerð til slíkt arbeiði er í landinum júst nú. Hetta er útgerð, sum NCC brúkti í undirsjóvartunlinum undir Vestmannasundi. Tí varð avtalað við NCC at gera hetta arbeiðið í Norðskálatunlinum, meðan útgerðin var her kortini.

– Hetta skal so gerast í øllum førum, vísir Finnleif Durhuus á.

Hann sigur, at tey hjá Landsverkfrøðinginum eru greið yvir, at tað hevur verið til ampa fyri summi at skula koyra um Eiðisskarð. Vegurin har er als ikki ætlaður til ta ferðsluna, sum hevur verið hesar dagarnar, tunnilin hevur verið stongdur.

Annars sigur Finnleif Durhuus frá arbeiðsformanninum hjá Landsverkfrøðinginum í Norðureysturoy, at ferðslan hevur gingið rímiliga væl um Eiðisskarð hesar dagarnar, tunnilin hevur verið stongdur.

Men tað hevur við hvørt verið til ampa fyri arbeiðið inni í tunlinum, at fólk ikki virða skeltini, sum standa uttan fyri tunnilin og siga frá, at hann er stongdur, sigur Finnleif Durhuus, leiðari á Vegadeildini hjá Landsverkfrøðinginum.

# Eystanstevnan farin um tey fýrati

**Tað eru 41 ár liðin, síðan Eystanstevnan varð hildin fyrstu ferð. Nú, hon verður hildin komandi vikuskiftið, verða tað aftur ítróttur, mentan og undirhald, sum í stóran mun fara at mynda stevnuna**

EYSTANSTEVNA
*Edvard Joensen*

**Runavík:** Eystanstevnan byrjar í Runavík við kapprenning í annaðkvøld klokkan 18.00. Hildið verður so á til seint sunnukvøldið, tá endað verður við kvøldsetu í ítróttarhøllini.

Leygardagin klokkan 13.00 fer skrúðgonga úr Glyvra Skúla út á Torgið, har Hans Petur Ellingsgaard, formaður í Mentanarnevnd Runavíkar Býráðs, setir Eystanstevnuna.

Tiltøkini eru mong, sum eru skránni hesar tríggjar dagarnar, Eystanstevnan er. Ymiskt mentanartiltøk, undirhald av ymsum slagi. Ein rúgva av kristiligum møtum og tiltøkum. Og rættiliga nógvur ítróttur.

Høvuðstiltakið er sum vera man FM-kappróðurin, sum verður leygardagin klokkan trý.

Sum nakað nýtt fer Mentanarhúsfelagið at framføra Eystanstevnukabarett í Glyvra Skúla. Tvær sýningar verða á sjálvari stevnuni, Tann fyrra verður fríggjakvøldið klokkan 21.30, og tann seinna verður leygarkvøldið klokkan 19.00.

Verður undirtøkan góð, verður møguliga onkur eykasýning aftur í næstu viku, fréttist frá fyrireikarunum.

Fótbóltur verður nógvur á stevnuni, og byrjað verður longu klokkan hálvgum níggju leygarmorgunin, tá smápiltarnir hjá NSÍ fáa vitjan av Toftum, eins og genturnar fáa tofta- og skálagentur á vitjan. Tann stóri stevnudysturin er sum vant sunnudagin klokkan trý, tá NSÍ og TB spæla landskappingardyst í Runavík, har heppikór hjá NSÍ eisini fer at vera at síggja á vøllinum undan dystinum eins og í hálvleikinum.

Fríggjakvøldið klokkan 23.00 verður Eystanstevnukonsert á parkeringsøkinum oman fyri brotið, har ymsir tónleikabólkar fara at luttaka.

Umframt verður dansur í Støkkhøllini bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið, eins og dansur eisini verður í ítróttarhøllini leygarkvøldið.

Leygarkvøldið klokkan 23.30 byrjar midnáttarsamkoma á Torginum, har horntónleikur, kórsangur, midnáttarøða, felagssangur og fýrverkarí verða á skránni.

Ymsu samkomurnar hava nógv møti, konsertir og opið hús ymsastaðni í býnum á Eystanstevnu, og sunnumorgunin klokkan 11.00 hevur Meinhard Bjartalíð, prestur, guðstænastu í Glyvra Kirkju.

Bygdasavnið Forni hevur framsýningar ymsastaðni. Í bygdasavninum á Glyvrum, í Gamla Handli hjá Pidda og umborð á Høganesi.

Nógvur tónleikur verður ymsastaðni í býnum, og sjálvandi verður eisini Tivoli á á stevnuøkinum alla Eystanstevnuna.

# Vánalig ferðslumentan

**Hóast tað er týðuliga merkt uttan fyri báðar munnarnar á Norðskálatunlinum, at bara lastbilar og bussar hava loyvi at koyra har, meðan arbeitt verður, koyra kortini fleiri persónbilar ígjøgnum**

FERÐSLUMENTAN
*Edvard Joensen*




*Hjá summum tykist tað einki at hava at siga, hvat lóg og rættur siga, tú skalt gera ella ikki. Eitt ferðsluskelti, sum noktar koyring gjøgnum tunnilin, verður bara tikið niður, og koyrt verður so víðari*
*Mynd: Edvard Joensen*

Tað eru veruliga bilførarar, sum beinleiðis halda hánt um uppsettu ferðluskeltini í samband við arbeiðið í Norðskálatunlinum og koyra gjøgnum tunnilin, hóast tað ikki er loyvt.

Hetta er, umframt at vera ólógligt, bæði til ampa fyri arbeiðið inni í tunlinum, og beinleiðis vandamikið fyri bæði arbeiðsfólkið, sum har er, og bilførarar og ferðafólk í hesum bilunum, sum strúka gjøgnum eitt ótryggjað arbeiðspláss.

Heldur ikki á vegnum, har ferðslan er víst til, nú arbeitt hevur verið í Norðskálatunlinum, verður altíð koyrt eftir teimum umstøðum, sum nú einaferð eru har.

Ferðslumentanin er so sum so hjá føroyinginum, kann sannast, tá koyrt verður á vegastrekkinum av Eiði til Funnings.

Eitt er, at summi fólk duga ella tora illa at koyra á hesum smala vegnum, og á tann hátt hava tey darvað ferðsluni nakað.

Annað er, at summi halda seg duga so mikið væl at koyra, at tey eru til ampa fyri onnur, sum kenna seg mestsum trokað út av vegnum, tá hesir bilarnir koma strúkandi eftir smølu breytini uttan at taka fyrilit fyri øðrum ferðandi, verður sagt av politistøðini í Runavík. Teir siga seg hava frætt frá fólki, sum hevur kært seg um hetta.

Fólk, sum hava vent sær til Sosialin, vita at siga, at tað er so galið, at skeltini, sum sett eru upp at siga frá, at Norðskálatunnilin er stongdur orsakað av arbeiði, hava verið tikin niðuraftur, og bilar hava síðan koyrt gjøgnum tunnilin, sum einki var.

Frá Landsverkfrøðinginum verður váttað, at tað hevur verið til ávísan ampa inni í tunlinum, at persónbilar, hóast forboðið, hava koyrt har, meðan arbeitt hevur verið.

Summir persónbilar tykjast bíða, til ein lastbilur ella bussur fer ígjøgnum, og heingja seg so upp í hesar, meðan aðrir eru so frekir, at teir bara fara ígjøgnum, hóast stongsulin.



# Ætlar sær at ansa væl eftir Jørgin Niclasen

**Nývaldi formaðurin í Landsstýrismálanevndini, Heini O. Heinesen ávarar landsstýrismannin í fiskivinnumálum ímóti at bróta lógina**

POLITISK UMSITING
*Áki Bertholdsen*



*– Nú er Jørgin Niclasen ávaraður, sigur Heini O. Heinesen, formaður í landsstýrismálanevndini*

– Eg ætli mær at hava eitt vakið eyga við Jørgin Niclasen.

Heini O. Heinesen, leggur hart út í sínum nýggja starvi sum formaður í Landsstýrismálanevndini.

Landsstýrismálanevndin skal m.a. hava eftirlit við umsitingini hjá landsstýrisfólkunum.

Og tað uppgávuna ætlar hann sær at taka bókstaviliga.

Og hann tykist longu at hava fingið eitt serliga gott eyga til Jørgin Niclasen, landsstýrismann í fiskivinnumálum og hansara umsiting.

Heini O. Heinesen sigur, at hann hevur fingið varhugan av, at tað er í umbúna at seta ymisk tiltøk í verk á fiskivinnuøkinum, sum er í stríð við lógina.

– Men tað skal vera púra greitt, at eg fari at hava eitt vakið eiga við, hvat hendir. Og fer nakað fram, sum er í stríð við lógina, skal ongin ivi vera um, at eg fari at taka tað upp beinanvegin.

– So við hesum Jørgin Niclasen ávaraður, leggur hann afturat.

## Útróðrarbátar til línubátar

Heini O. Heinesen sigur, at tað, hann hevur fingið frænir av, er, at ætlanin er at reiðarar ætla at leggja útróðrarbátar og at útvega sær línuskip ístaðin fyri.

– Hetta er ólógligt, tí í lógini stendur, hvussu stóran prosentpart av samlaða fiskiskapinum, hvør bólkur skal hava.

Eitt nú stendur, at línuskipini eiga 23% av toskinum og 28% av hýsini. Hinvegin eiga útróðrarbátar yvir 15 tons, 31% av toskinum, 34,5% av hýsuni og 11,5% av upsanum. Og útróðrarbátar undir 15 tons eiga 20% av toskinum, 23,5% av hýsuni og 6% av upsanum.

– Sostatt er stendur tað í lógini, hvussu stóran part av teimum ávísu fiskasløgunum, sum eru at fiska undir Føroyum, hvør bólkur av bátum eigur.

Formaðurin í landsstýrismálanevndini sigur, at hendir so tað, at útóðrarbátar verða lagdir og línuskip útvegað ístaðin, verður tað ein spurningur, hvørjum skipabólki, tey skulu fiska prosentini frá- tvs. um tey framhaldandi skulu fiska av prosentunum hjá útróðrarflotanum, ella um tey skulu fiska av prosentunum, sum eru tillutað línuskipunum.

Samstundis fer tað eisini at økja um veiðitrýstið leggja útróðrarbátar og fáa línuskip ístaðin, og tað er eisini ímóti lógini.

Hann leggur afturat, at umframt at vera ímóti lógini, fer tað eisini at gera tað óliviligt hjá línuskipunum, tí tað er ivaleysa trongt sum er og tað er ikki pláss fyri fleiri línuskipum, serliga tá ið hugsað verður um, hvussu stóran prosentpart av fiskasløgunum, linuskipini eiga.

– Verða útróðrarbátar lagdir og gjørdir um til línuskip, verður fiskivinnumynstrið fullkomiliga broytt og tað er ikki heimild til.

– At fiskidagar verða fluttir ímillum bátar og skip í húkaflotanum eitt ár ísenn, er nakað heilt annað. At leggja útróðrarbátar og útvega sær línuskip ístaðin, er nakað heilt annað og tað haldi eg ikki er í samsvari við lógina.

– Og sum formaður í landsstýrismálanevndini, ætli eg mær als ikki at sita hendur og favn ímeðan tað verður gingið lógini ov nær á hesum øki, tí tað skal steðgast í føðingini, sigur Heini O. Heinesen.

Men sum Jørgin Niclasen sigur í aðrari grein her í blaðnum, skilir hann onki av tí, sum formaðurin í Landsstýrismálanevndini førir fram…

# Heini skal ansa eftir okkum øllum

**– Tað er margháttligt at siga, at hann serliga skal hava eyguni eftir mær, sigur Jørgin Niclasen**

POLITISK UMSITING
*Áki Bertholdsen*



*– Landsstýrismálanevcndin skal ikki brúkast til at føra politikk við, so eg vænti mær ikki serviðgerð frá henni, sigur Jørgin Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*

– Eg veit ikki, hvat Heini O. Heinesen tosar um.

Jørgin Niclasen, landsstýrismaður skilir sett ikki, hví nývaldi formaðurin í landsstýrismálanevndini sigur, at hann ætlar sær at ansa serliga væl eftir umsitingini í Fiskimálaráðnum.

Í aðrari grein her í blaðnum, beinleiðis ávarar Heini O. Heinesen landsstýrismannin í fiskivinnumálum ímóti at bróta lógina.

– Landsstyrismálanevndin skal hava eitt vakið eyga við umsitingini hjá øllum landsstýrisfólkunum og sostatt eisini við mær.

– Og eg vænti mær onki minni av Heina O. Heinesen, enn at hann eisini livir upp til sína uppgávu, sigur Jørgin Niclasen.

– At siga, at hann skal fylgja serliga væl við mær, er ein margháttlig útsøgn. Landsstýrismálanevndin skal ikki brúkast til at føra politikk við, leggur hann afturat.

## Ongar ætlanir

Annars hevur Jørgin Niclasen ikki ánilsi av, hvat Heini O. Heinesen tosar um.

– Eg veit ikki um nakrar serligar ætlanir, sum kundi givið honum høvi til tala at, longu frammanundan.

Jørgin Niclasen sigur, at sjálvsagt arbeiðir Fiskimálaráðið eftir lógini og tað ætlar hann at halda fram við.

– Koma umsóknir til Fiskimálaráðið ætla vit at viðgera tær eftir lógini, hvørki meiri ella minni. Og tað, sum hendir á fiskivinnuøkinum, skal sjálvsagt vera eftir lógini.

– Og fáa vit hinvegin umsóknir, vit ikki hava heimild at ganga á møti, verða tær heldur ikki gingnar á møti, so einfalt er tað, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

Annars sigur hann, at prosentbýtið fyri, hvussu stóran part av hvørjum fiskaslagi, hvør bólkur av skipum og bátum eiga, er bara vegleiðandi og tískil ikki avgjørt bindandi.

– Hetta er ein leivd frá teirri tíðini, vit høvdu kvotaskipanina og tað er ein spurningur, hvussu leingi tað verður í gildi afturat.

Hann leggur afturat, at er talan um at leggja loyvir saman, eru reglarnar púra greiðar og lutfalsliga einfaldar.

– Tað er loyvt at leggja bátar saman. Verða tveir bátar lagdir saman, ber til at útvega sær ein størri bát. Tá hyggja vit eftir, hvussu stórir bátarnir eru. Vit ganga longd, ganga breidd ganga dýbd og verða tveir bátar lagdir saman, kann nýggi báturin verða eins stórur og hinir báðir tilsamans. Men tað er avgerðandi, at veiðitrýstið ikki skal veksa.

– Skal hetta ikki vera loyvt í eini fiskivinnutjóð, heldur alt uppat, tí tað er alt avgerandi, at vinnan sleppur at minnast, sigur Jørgin Niclasen

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra 1,0** grønur, 3 hurðar, árg. 2000, 27.000 km. — 88.000
**Nissan Almera 2,0 Diesel GX** grønur, 5 hurðar, árg. 1997, 110.000 km. — 110.000
**Nissan Almera 2,0 Diesel GX** reyður, 4 hurðar, — 110.000
**Nissan Primera 1,6** svartur, 4 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. — 110.000
**Nissan Primera 2,0 SLX** hvítur, 4 hurðar, árg. 1997, 45.000 km. — 105.000
**Nissan Primera 1,6 LX** gráur, 4 hurðar, árg. 1995, 126.000 km. — 69.000
**Nissan Primera 2,0** reyður, 4 hurðar, árg. 1991, 121.000 km. — 55.000
**Nissan King Cab 4x4 Diesel Turbo** blágráur, 2 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. — 130.000
**Nissan King Cab 4x4 Diesel** gráur, 2 hurðar, árg. 1996. — 78.000
**Peugeot 106 Diesel** gráur, 3 hurðar, árg. 1996, 110.000 km. — 72.000
**Peugeot 206 XR 1,4** svartur, 3 hurðar, árg. 1999, 88.000 km. — 100.000
**Peugeot 306 Hdi 2,0 St.car** svartur, 5 hurðar, árg. 1998, 60.000 km. — 120.000
**Peugeot 306 DT 1,9** bláur, 4 hurðar, árg. 1997, 150.000 km. — 90.000
**Peugeot 605 SRDT 2,1 Aut.** bláur, 4 hurðar, árg. 1994, 230.000 km. — 120.000
**Opel Corsa 1,4** reyður, 5 hurðar, árg. 1996, 105.000 km. — 68.000
**Opel Corsa 1,2S** reyður, 5 hurðar, árg. 1990, 120.000 km. — 10.000
**Opel Astra 1,6** reyður, 5 hurðar, árg. 1999, 52.000 km. — 119.000
**Opel Astra 1,6** svartur, 5 hurðar, árg. 1998, 55.000 km. — 105.000
**Opel Vectra 1,4** hvítur, 4 hurðar, — 26.000
**Opel Vectra 2,0 Di** bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 96.000 km. — 130.000

Gevi gætur: Bilarnir á listanum kunnu ver a seldir
Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin